# Vøggustova og barnagarður við Landavegin

*Á hesum økinum við Landavegin er ætlanin at byggja ein nýggjan dagstovn.*



Mentamálanevndin hjá Tórshavnar býráð er komin ásamt um, at ein dagstovnur skal byggjast við Landavegin í Havn.

Barnagarðurin verður bygdur á økinum yvirav handlinum hjá Eli á Landavegnum.

Stovnur fer eftir ætlan at kosta uml. 10,5 mió. at byggja.

Pláss verður fyri 60 børnum tilsamans á stovninum – 24 vøggustovubørnum og 36 barnagarðsbørnum.

Í sambandi við byggingina hevur kommunan sagt eitt leigumál á trøðni upp.

Á býráðsfundi hóskvøldið mótmælti minnilutin í býráðnum byggingina og mælti ístaðin til at flyta hesi eitt vet longur móti vegnum, tí økið skal nýtast til annað endamál.

**HR**

## Sosialurin um vikuskiftið

Hevur tú eitthvørt, ið tú heldur kann hava áhuga fyri Sosialin hetta vikuskiftið, so er Sosialurin at hitta á telefon 227948 ella á teldupostadressuni: ingrid@sosialurin.fo




# Eldur í ruski á Sandvíkahjalla

ELDUR
*Mortan Seyer Vistrup*

Fríggjamorgunin vórðu boð send eftir sløkkiliðnum og løgregluni at koma niðan á brennistøðina á Sandvíkahjalla.

Edur var í ruskdunganum, inni á høllini, har ruskið verður goymt, áðrenn tað fer í ovnin.

Tað er ikki óvanligt, at hetta hendir, og sløkkiliðið bæsti skjótt eldinum, sum ikki gjørdi skaða á brennistøðina.



*Menn frá sløkkiliðnum í Havn í ferð við at bæsa eldinum í ruskdunganum á brennistøðini á Sandvíkarhjalla*
*Mynd: Jens Kristian Vang*






# Kvívík lá í streymloysi

**Klokkan gott níggju hóskvøldið fór streymurin í Kvívík, og hann kom ikki aftur fyrr enn um eitt tíðina**

STREYMSLIT
*Solby A. Eliasen*

Fólk í Kvívík høvdu ongan streym í góðar tríggjar tímar hóskvøldið. Og tá fólk fóru til arbeiðis fríggjamorgunin varnaðust tey, at ein stórur motorur stóð og gav bygdini streym. Frá SEV siga tey, at talan var um streymslit, sum ikki ber til at verja seg ímóti. Tað var ein samling millum linjuanleggið og kápulanleggið, sum var farin. Og tá tílíkt hendir er tað vanligt, at SEV setur ein motor upp til at veita streym.

– Tílíkt arbeiði tekur nakrar tímar at gera, og fyri at minka um tíðina við streymloysi, so stilla vit ein motor upp, verður sagt frá SEV. Motorurin veitti so bygdini streym, og tískil var ikki neyðugt at fáa fólk at arbeiða við trupulleikanum um náttina, men heldur varð farið í gongd beinanvegin fríggjamorgunin.

Sum sagt, so fáa tey ikki vart seg móti tílíkum streymslitum, men kvívíkingar kundu vænta, at fáa reglugligu streymveitingina aftur seinnapartin fríggjadagin.

Tílíkt hendir ikki ofta, men tað kemur fyri eina ella tvær ferðir um árið.

*Hesin motorurin var streymveitarin hjá Kvívík ein stóran part av fríggjadegnum, tá eitt streymslit hóskvøldið legði bygdina myrka í góðar tríggjar tímar*
*Mynd: Jens K. Vang*



# Tekniski skúli í Klaksvík byggjast út

**Ein arbeiðsbólkur settur av Mentamálastýrinum hevur gjørt eina lýsing av tørvinum hjá Tekniska skúla fyri at kunna virka sum ein miðnámsskúli. Og nú hevur skúlin fingið eina játtan upp á, at arbeiðið kann byrja**

ÚTBYGGING
*Solby A. Eliasen*




*Tekniski skúlin í Klaksvík hevur havt hølistrupulleikar í fleiri ár, men arbeiðið upp á at byggja skúlan út fer í gongd í ár*

**Klaksvík:**
Arbeiðsbólkurin, sum varð settur av Mentamálastýrinum, er komin til ta niðurstøðu, at skúlin í verandi líki als ikki nøktar tørvin hjá næmingum, lærarum ella starvsfólkum sum ein miðnámsskúli.

Skúlin hevur sostatt fingið eina játtan upp á eina millión í ár á fíggjarlógini og eina tilsøgn frá Mentamálastýrinum upp á tær 11 milliónirnar, sum arbeiðið er mett at kosta. Og ætlanin er, at hetta árið skal nýtast til verkætlanina.

Rúni Heinesen, skúlastjóri, væntar, at sjálvt arbeiðið fer at byrja síðst í hesum árinum ella fyrst í komandi. Hann dylir ikki fyri, at henda útbygging hevur verið hart tiltrongd í fleiri ár nú, og at hon kemur at hava stóran týdning fyri skúlan framyvir.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt eina frágreiðing um tørvin hjá skúlanum. Millum annað er tørvur á einum trimum vanligum skúlastovum, tveimum minni undirvísingarhølum og fýra serstovum til eitt nú Matvøru-Framleiðslu, Alisfrøði og so framvegis.

Eisini heldur arbeiðsbólkurin, at sosiali tørvurin haltar. Tey mæla tí til, at eitt felagshøli verður gjørt til næmingarnar, soleiðis at tey hava eitt stað at detta inn í, har tey skulu kunna sita og gera bólkaarbeiði, heimaarbeiði og annars hugna sær við einum kaffimunni. Hetta høli skal geva skúlanum eitt hugnaligt umhvørvi, har næmingarnir trívast, verður sagt í frágreiðingini.

Mangt annað kemur eisini fram í frágreiðingini, sum telur einar tólv síður. Tey hava til dømis útgreinað tímatal upp á, hvussu nógv tær ymisku serstovurnar koma at verða nýttar, eisini hava tey lýst eitt møguligt samstarv við HF-skeiðið í Klaksvík og kostnaðarmeting og íløgutørvur eru eisini lýst.

Niðurstøðan hjá bólkinum er greið. Tekniski skúlin má byggjast út, um hann skal kunna bjóða næmingum sínum eina miðnámsútbúgving á sama støði sum hinir miðnámsskúlarnir í landinum.

Miðnámsútbúgvingin HT tekur trý ár, og hevur næmingatalið verið vaksandi seinnu árini. Og frá skúlanum verður sagt, at um hugsað verður um undirsjóvartunnilin, sum kemur upp í Borðoyavík, so kann væntast, at næmingatalið fer at økjast munanditey komandi árini.

Útbyggingararbeiðið upp á Tekniska skúla verður mett at koma at kosta um 11 milliónir, og byggjaríið fer helst at strekkja seg yvir hetta árið og so tvey ár afturat. Mentamálastýrið fer nú at arbeiða við at gera eina verklagslóg, sum skal tryggja, at játtanin fylgir við arbeiðinum. Og tekniski skúlin hevur fingið at vita, at henda lógin skuldi farið at komið við í hesu tingsetuni.

